Kappingarráðið

Advokatskrivstovan
Frúutrøð 4
Postboks 6
110 Tórshavn
Føroyar

**Tórshavn, 20. apríl 2010**

Okkara journal nr.: 10/00124-2
Tykkara nr.: 20100173
Viðgjørt: S.R.

**Att: Christian Andreasen, adv.**

# Avgerð viðv.: P/f Poul Michelsen yvirtekur allan partapeningin í P/f Skimma

## Samandráttur

P/f SMS og P/f Poul Michelsen eru komin ásamt um, at P/f SMS selur allan partapeningin í P/f Skimma til P/f Poul Michelsen.

P/f Skimma var seinast handlað í 2008, tá P/f SMS, ið átti umleið helmingin av partapeninginum, keypti ISS Facility Service A/S út. Yvirtøkan var góðkend við teirri grundgeving, at broytingin í ræðisrættinum onga ávirkan fór at hava á kappingina á marknaðinum. Yvirtøkan tá, førdi ikki til nakra broyting í miðsavningini á marknaðinum.

Kappingareftirlitið metir somuleiðis ikki, at yvirtøkan hesaferð førir við sær, at virkna kappingin á marknaðinum verður hindrað, við tað at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist.

Kappingareftirlitið hevur skilmarkað viðkomandi markna til marknaðin fyri reingerðartænastur til almennar stovnar, privatar fyritøkur og privatpersónar.

Kappingareftirlitið metir, at atgongdin til marknaðin má metast at vera góð, tí tað er ikki serliga kostnaðarmikið at stovnseta virki í hesi vinnu. Lítil og eingin íløga skal gerast og ongin serútbúgving ella serloyvi eru neyðug fyri at byrja innan hesa vinnu.

Kappingareftirlitið mælir til, at yvirtøkan hjá P/f Poul Michelsen av P/f Skimma verður góðkend, tí yvirtøkan ikki førir við sær, at virkna kappingin verður hindrað, við tað at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkt, sbrt. § 15, stk. 1.

Kappingareftirlitið metir ikki, at tað eru viðurskifti í sambandi við yvirtøkuna, ið gera at tað er neyðugt at treyta yvirtøkuna, sbrt. § 15, stk. 2.

## Heimildir

Kapittil 5 í Kappingarlógini

## Avgerð

Kappingarráðið hevur avgjørt at góðkenna yvirtøkuna av P/f Simma. Grundað á teir upplýsingar sum Kappingarráðið hevur kunnleika til, verður ikki mett at yvirtøkan førir við sær, at virkna kappingin verður hindrað, sbrt. § 15, stk. 2.

## Málslýsing

Kappingareftirlitið fekk tann 24. mars. 2010 fráboðan um samanlegging frá Christian Andreasen, adv., sum vegna P/f SMS og P/f Poul Michelsen boðaði frá, at P/f SMS ynskti at selja allan partapeningin í P/f Skimma til P/f Poul Michelsen.

Kappingareftirlitið hevur tann 31. mars 2010 boðað Christian Andreasen, adv. frá, at fráboðanin er mett at verða fullfíggjað, og at Kappingarráðið hevur 30 dagar, frá tí at fullfíggjað fráboðan er móttikin, til at boða frá um neyðugt er at kanna kappingarligu ávirkanina av yvirtøkuni nærri. Seinasta freist at boða frá hesum er tann 22. apríl 2010.

P/f Skimma var seinast handlað í 2008, tá P/f SMS, ið átti umleið helmingin av partapeninginum, keypti hin helmingin frá ISS Facility Service A/S. Yvirtøkan var tá góðkend við teirri grundgeving, at broytingin í ræðisrættinum onga ávirkan fór at hava á kappingina á marknaðinum.

## Fyritøkurnar

Fyritøkan sum selur er P/f SMS, hvørs virkisøki serliga liggur innan sølu av mat- og húsarhaldsvørum. P/f SMS eigur eitt dóttirfelag, P/f Skimma og eitt leyst atknýtt felag, P/f Dvøljan, ið rekur matstovuvirksemi í SMS. Høvuðspartaeigarar eru Sp/f NM Holding og Hagar hf.

Fyritøkan sum keypir er P/f Poul Michelsen, sum rekur heilsøluvirksemi. P/f Poul Michelsen eigur trý dóttirfeløg, Atlantic Partner A/S, Atlas - Føroyar Sp/f og Frá 31/10-1979 P/f.

Atlantic Partner A/S rekur heilsøluvirksemi innan búnýti og reiðskap. Atlas – Føroyar er flutningsfelag, ið m.a. flytur alla vøru fyri P/f Poul Michelsen. Frá 31/10-1979 P/f hevur onki virksemi og sambært fráboðara verður felagið eftir ætlan avtikið.

Høvuðspartaeigarar í P/f Poul Michelsen eru: Gunnar D. Mohr, NM7 Sp/f, P.A.D. Sp/f, PM-Holding P/f, Poul J.S. Michelsen.

## Viðkomandi marknaður

Viðkomandi marknaður er marknaðurin fyri reingerðartænastur til privatar fyritøkur og almennar stovnar. Tað eru fleiri fyritøkur á hesum marknaði, t.d. Dveylan Sp/f, Føroya Virkisvask Sp/f, Vaskarí & reingering Sp/f, Vaskihjálpin Sp/f og Skimma P/f.

Sambært § 5 í kappingarlógini skal viðkomandi marknaður skilmarkast við støði í eftirspurnings- og útboðsvarasetingini. Skilmarking við støði í eftirspurrningsvarasetingini merkir í stuttum, at kannast skal eftir hvørjar vørur brúkarin kann hugsast at skifta yvir til, um prísurin á eini ávísari vøru økist lutfalsliga í mun til allar aðrar. Tá útboðsvaraseting verður kannað verður mett, um tað eru veitarar sum eitt andsvar upp á smáar varandi broytingar í lutfalsligu prísunum innan styttri tíðarskeið kunna umstilla framleiðsluna til viðkomandi vøruna ella tænastuna og marknaðarføra hesar innan styttri tíðarskeið uttan týðandi meirkostnað og vága.

Møgulig kapping skal kannast, tá støðan hjá viðkomandi fyritøkum á marknaðinum er skjalfest, og støðan gevur orsøk til iva, um lógarbrot er framt.

Kappingareftirlitið metir, at brúkarin hevur fleiri alternativar møguleikar, um P/f Skimma økir sínar prísir. Sum fyrr nevnt eru fleiri fyritøkur, sum veita somu tænastu. Somuleiðis eru fyritøkur, sum ikki eru á júst sama marknaði, men sum kunnu umstilla sítt virksemi innan stutta tíð og uttan stórvegis meirkostnað og vága.

Afturat hesum er at siga, at atgongdin til marknaðin má metast at vera góð, tí tað er ikki serliga kostnaðarmikið at stovnseta virki í hesi vinnu. Lítil og eingin íløga skal gerast og ongin serútbúgving ella serloyvi eru neyðug fyri at byrja innan hesa vinnu.

Kappingareftirlitið metir tí, at tað er rætt at skilmarka marknaðin til marknaður fyri reingeringar-tænastur til almennar stovnar, privatar fyritøkur og privat persónar.

Kappingareftirlitið hevur ikki innheintað umsetningstøl, tí mett verður ikki, at yvirtøkan førir við sær økta miðsavning á marknaðinum. P/f Poul Michelsen er áðrenn yvirtøkuna ikki umboðað á marknaðinum, ei heldur á øðrum atliggjandi marknaði.

## Meting

Kappingareftirlitið metir ikki at yvirtøkan førir við sær, at virkna kappingin verður hindrað, við tað at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist, sbrt. § 15 í kappingarlógini.
P/f Poul Michelsen, ið fær ræði á P/f Skimma, hevur ikki virksemi á viðkomandi marknaði ei heldur á øðrum atliggjandi marknaðum. Tí verður ongin miðsavning skapt ella styrkt við hesi yvirtøku.

Kappingareftirlitið hevur gjøgnumgingið alt tilfarið, sum fráboðari hevur sent. Talan var m.a. um keypsáttmálan, ymisk notat viðv. lønar- , leigu og kundaviðurskiftum. Kappingareftirlitið er ikki komið fram á nøkur viðurskifti, ið gera at yvirtøkan eigur at verða treytað, sambært § 15, stk. 2 í kappingar-lógini.

Kappingareftirlitið mælir til, at yvirtøkan av P/f Skimma verður góðkend, tí yvirtøkan, sambært teimum upplýsingum sum Kappingareftirlitið hevur kunnleika til, ikki hindrar virknari kapping, sbrt. §15, stk. 1.

## Niðurstøða

Grundað á teir upplýsingar Kappingarráðið hevur kunnleika til, verður ikki mett at yvirtøkan førir við sær, at virkna kappingin verður hindrað, við tað at ein marknðarráðandi støða verður skapt ella styrkist.

Her verður serliga hugsað um, at P/f Poul Michelsen áðrenn yvirtøkuna ikki hevur nakað virksemi á viðkomandi marknaði ella atliggjandi marknaði.

## *Kæruvegleiðing*

Avgerðir tiknar av Kappingarráðnum eftir §15 í kappingarlógini kunnu, innan 4 vikur eftir móttøku av hesum skrivi, kærast til Vinnukærunevndina, co. Føroya Kærustovnur, Undir Hornabakka, Postsmoga 45, Fo-110 Tórshavn.

Víst verður í hesum sambandi til kapittil 8 í kappingarlógini.

Vegna Kappingarráðið

Ingunn Ó. Eiriksdóttir
formaður

/Terje Sigurðsson
deildarstjóri